*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*post@sosialurin.fo*



quartet style. Eg vildi vita, hvørja kvartett honum dámdi best. Hann nevndi Norfolk Jubilee Quartet. Hetta var ein kvartett við Norman Harris sum leiðara, sum byrjaði við at spæla blandað andaligt og verðsligt, men seinni skifti til at bara spæla gospel.

- Teir kenni eg, segði eg, men fakta er, at eg havi bara ein sang. Men eg visti, at Elvis spælir minst ein og kanska fleiri sangir í teirra útseting, so eg segði, at fleiri útsetingar hjá teimum hava yvirlivað.

- Ja, segði hann.

- Eg havi brúkt nógvar av hansara útsetingum. Mær dámdi hann, tí at hann dugdi at gera so nógv við sangirnar. Hann dugdi ikki at syngja »hard gospel« av tí slagnum, sum vit syngja, men mær dámar hann, tí at hann fær tað at ljóða pent.

### Diamond Jubilation

Eftirsum at fløgan Diamond Jubilation, sum er fýra ára gomul, er tann, sum vit kenna best, tí at hon hevur verið mest spæld í ÚF, Rás2 og Lindini, fekk hann ein spurning um hana. Spurningurin var, um produsarin hevði stóra ávirkan á sangirnar og ljóðið. Larry Campbell, sum spældi gittara hjá Bob Dylan frá 1997 til 2004, produseraði plátuna, og hann fekk ein sang frá Bob Dylan, sum hann ikki hevur spælt inn sjálvur. Ira svaraði, at produsarin kom við flestu sangunum, og at hann bara skrivaði ein ella tveir sjálvur, men hann helt sjálvur, at Diamond Jubilation er ein tann besta plátan hjá teimum. Men tað var bara keðiligt, at plátufelagið ikki gjørdi meir fyri at fáa hana selda.

### Á veg út úr Tøtingarvirkinum

Ira tosaði um onnur ting. Um Elvis og um føroysku fjøllini. Tað er alt á bandi, og kanska tað verður brúkt til okkurt seinni. Á vegnum út tók hann í hondina á Rutt, konu míni, sum hevði sitið aftan fyri okkum alla tíðina, uttan at eg visti av tí. Hon segði við hann, at pápi hennara hevur sungið bass í einari kvartett í nógv ár. Eg legði afturat, at vit hava tvey smábørn. Tá segði hann, at hann og konan hava trý børn. Av teimum var ein sonur, sum sang við The Pretenders í 22 ár, og ein dóttir, sum sang saman við Stevie Wonder í 18 ár. Ein so eyðmjúkur maður hevur neyvan brúk fyri at reypa. Men eg haldi heldur ikki, at tað var tí, at hann segði tað. Hann segði tað sum ein pápi, sum tosar um børn síni. At hann dugdi at skemt við aldrinum, vísti hann eisini á vegnum út. Hann fór yvir til eina stóra plakat við einum manni á og segði

- er hatta ein plakat? Nú mundi eg heilsað upp á handan mannin.

Ein tíma seinni fóru Dixie Hummingbirds oman á sandin at syngja, og tað var ein stór uppliving.



*The Dixie Hummingbirds framførdu á G! Festival 2007. Samrøðan, ið Meinhard Jensen hevði við Ira Tucker, fór fram ein tíma áðrenn framførsluna*

*Mynd: Ólavur Frederiksen*

# Ummæli
# Festligur dansipoppur

**Havnarmarðurin Janus Rasmussen hevur, saman við íslendska bólki sínum Bloodgroup, latið eina festliga útgávu úr hondum. Men ov langt er millum ordiliga góðu upplivingarnar á »Sticky Situation«**

**UMMÆLI** ★★★☆☆☆
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*



Fyri jól kom fyrsta fløgan hjá íslendsk/føroyska bólkinum Bloodgroup, »Sticky Situation« á marknaðin. Ein funky fløga, ið best kann lýsast sum lívligur og festligur elektroniskur dansipoppur. Tað er trupult at sita stillur, meðan man lurtar eftir Bloodgroup. Tað ljóðar, sum um tey hava tað ordiliga stuttligt, meðan tey gera tað, og spæligleðin smittar lurtaran.

Fløgan er tó festligari, enn hon er góð. Tey ellivu løgini eru á tremur við samplingum og øðrum ljóðum, ið gera ljóðmyndina ágangandi og í ein ávísan mun spennandi, men samstundis er tað tó ov langt millum ordiliga góðu upplivingarnar.

### Føroysk lama í Íslendskum systkinaflokki

Føroyska íkastið í bólkin er havnarmaðurin Janus Rasmussen, ið seinastu árini hevur búleikast í Íslandi. Í Bloodgroup samstarvar hann við unnustuna Lilju og beiggjar hennara Hall og Ragga.

Janus Rasmussen fekk sítt gjøgnumbrot á føroyska tónleikapallinum í Lama Sea. Á Planet Awards 2005 var hann í uppskoti sum ársins sangari, umframt, at Lama Sea var í uppskoti til heiðurslønirnar fyri besta nýggja tónleikanavn og ársins tónleikanavn.

Janus var longu kendur úr rokkbólkinum Speaker, men tað var við festliga og lívliga lama tónleikinum, at hann veruliga gjørdi vart við seg. Tað var eyðsýnt, at hetta var ein gávuríkur sangari og ein frálíkur oddamaður.

Hann hevur eisini saman við Lama Sea bassleikaranum Sakarisi Joensen gjørt tónleik undir navninum High Hat, og er eisini við á fløguni hjá Heiðriki.

### Peppað og jarðbundið

Á »Sticky Situation« deilir Janus rampuljósið við Lilju, ið gevur tí ofta yvirdrivið peppaða vokalinum hjá Janusi eitt meira jarðbundið mótspæl, hetta riggar serliga væl á lagnum »The Carpenter«, ið telist millum tey bestu á fløguni. Hetta er ikki minst tí, at hetta lag á vokal økinum hevur eina góða balansu. Janus er so villur sum ongantíð áður, og Lilja fitt og jarðbundin. Tað, at Liljusa rødd ikki telist millum heimsins áhugaverdastu, ger, at man troyttast av henni rættiliga skjótt, og hetta telir niður fyri heildarupplivingina. Tað er ringt at lata vera við at hugsa, um løg sum »Moving Like a Tiger« og »What I Mean« ikki høvdu verið betur við eini aðrari songkvinnu, eins og verru løgini eitt nú »Chuck«, »Rain« og »Human Qualities« kundu verið hampilig, um songkvinnan var betur. Tað er fyrst og fremst í løgunum, har Janus hevur størra leiklutin, at fløgan veruliga fær flog, sum á áðurnevnda »The Carpenter« og á »Try On«. Undantøk eru tó eitt nú »Ain't Easy«, har Janus ljóðar sum eina 80 ára parodi og »Red Egypt«, ið hevur eitt ótrúliga feitt Pet Shop Boys-kent niðurlag, og har Lilja er berandi røddin.

3 av 6 stjørnum fara til »Sticky Situation« hjá Bloodgroup.